Kunngerð

Tað verður her gjørt kunnugt at fíggjarætlan Tórshavnar kommunu fyri 1983/84 og fíggjarætlan Tórshavnar Havnar fyri 1983/84 liggja almennt frammi til kunningar á býráðsskrivstovuni í døgunum 5.—22. apríl 1983.

Tórshavnar býráð
28. mars 1983

Læknavaktirnar

Tórshavn: Sølvi W. Olsen, tlf. 16611, skirisd., Álvur av Kák, tlf. 12557, langafriggjad., Oddmar Færø, tlf. 13576, leygard., Kaj Kallsberg, tlf. 13150, páskad. og Andor Ellefsen, tlf. 12233, annan páskadag.
Eysturoyggin: Sverri Lamhauge, tlf. 48016, skirisd., Sigvald Kristiansen, tlf. 41490, langafriggjad., Magnus á Stongunum, tlf. 23006, leygard., Pól Johs. í Horni, tlf. 44038, páskad. og Sigvald Kristiansen, tlf. 41490, annan páskad.
Norðuroyggjar: Jaspur Petersen, tlf. 56400, skirisd., og langafriggjad. og Steingrimur Weihe, tlf. 55300, leygard., páskad. og annan páskad.
Vágar: Tlf. 32413
Suðuroy (norður): Tlf. 71560
Suðuroy (suður): Tlf. 73030

Tannlæknavaktin, Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst kl. 13,00—14,00. Ringið tlf. 14544.

Góðgerðarfólkið og teir durvandi fólkavaldu

sjónarmið

Ídag

Dagny Joensen, tíðindakvinna



Herfyri var eitt »sjónarmið« í Sosialinum. Í hesum segði Kári Petersen sína treytaleysu meining um klædnainnsavningina til Pólands, sum fór fram fyri stuttum.

Tó at fólk hava latið tað, tey ikki hava brúk fyri, so varð tað kortini latið fyri at hjálpa og stuðla teimum, sum hava brúk fyri hjálp. Ikki hava uppruddingar á loftum og í klædnaskápum kring alt Føroya land verið framdar við tí fyri eyga at leggja upp í uttanríkismál, ella tí tey høvdu eina aðra politiska áskðan enn teir ráðandi í Pólandi.

Kári Petersen ger gjøldur burtur úr teimum stoppaðu hosunum og gummiskónum,sum eins væl kundi verið sendir til USA, tí har er neyðin eins stór sum í Pólandi. Eg ivist ikki í, at fólk høvdu tikið eins væl undir við slíkum tiltaki — hvar á klótini tað var, tí soleiðis er føroyingurin. Vit eru uppald til at hjálpa har, tað er neyðugt.

— Tað ódámliga — eftir mínum tykki — er ikki at lata brúkt klæði til onnur, men heldur, sum í hesum føri, at heilar skipslastir verða avskipaðar, við tí sum vit hava tveitt burtur.

Her bagir keypiorkuni ikki nakað!

Nú eru vit fyri tí vanlagnu, at vit verða biðin um at stuðla hópin av málum, tó at her er hugað um innanríkismál á oyggjunum.

Tað kann ikki skerast burtur, at tað mangan sýnist leiðiligt og møtumikið altið at verða spurdur, um ein vil lata sítt ískoyti til tey mongu málini, sum privatfólk sjálvboðin royna at fáa á føtur.

Sum lønmóttakari rindar tú skatt til landið og kommununa, har tú býrt. Hesir pengar skulu síðan latast til tey ymsu økini, sum eru gjørd her á landi, til tess at skapa sømiligt kor fyri fólkið.

Nú kundi ein hugsað sær — varisliga — at siga, um tað ikki er nóg mikið, og hví vit skulu lata onnur ískoyti enn tey almennu gjøgnum skattin?

— Jú, vil tann vælmeinti borgarin siga, hetta verður gjørt fyri at stuðla eitt mál, og um vit ikki standa saman, so kemur einki burturúr!

Nú vil eg halda — enn varisligari — at so er tað teir ráðandi, sum ikki duga nóg væl at húsast við skattaborgarapeninginum, men her verður aftursvarið hópin av frágreiðingum um, at myndugleikarnir ikki kunnu stýra øllum, og tí noyðist hvør Hanus og Janus at hjálpa til!

Enn einaferð — varisliga — so eru politikarnir ikki sína uppgávu vaksnir, men at teir helst ganga meiri eftir, hvar atkvøður eru at fáa, enn eftir hvat neyðin er størst!

So vilja góðgerðarrøddirnar siga, at nógv dømi eru, sum vísa, hvussu neyðugt tað er at einstaklingar taka seg saman um eitt mál — eitt nú ítróttin, sum hevur nógva og góða sjálvbodna arbeiðsmegi.

So vil eg viðganga, at tá eg verið biðin um at stuðla ítróttin, so sigi eg nei! Bilsin við góðgerðarfólkið vita, hvi eg sigi so. — Jú, tí eg haldi, at ítrótturin hevur fingið nóg mikið!

— Hvat við teimum, sum ikki iðka ítrótt? Eg veit ikki, hvussu er statt úti á bygd, men um tú ikki iðkar ítrótt í Havn, er limur í fráhaldsfelag ella trúarbólki, so ert tú illa fyri. Kortini er einki ungdómshús í Havn, har ungfólk av sínum eintingum kunnu velja, hvat tey í fritiðini skulu fáast við.

So vil onkur siga, at meirilutin skal tilgóðasiggjast, — tað er demokrati.

— Eg vil halda, at demokrati er sosialt rættvísi — er at stuðla tann veika, hóast hann í tali er í minniluta.

Og kortini — tað kann ikki dyljast, at góðgerðararbeiði er besta dømi um, hvussu munagott úrslt kann spyrjast burturúr. Bert fyri at taka eitt dømi: stuðulsarbeiðið til frama fyri ellis -og røktarheimið í Havn.

Tá starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum, sum eru um sjúklingarnir á uppihaldsdeildini, ikki kundu góðtaka vánaliga umhvørvið, sum hesi fólk liva undir, tóku tey seg saman av sínum eintingum at savna pening saman. Hetta førdi við sær, at tiltøk til frama fyri henda stovn í Havn eisini vóru roynd á bygdunum kring landið.

Hetta gjørdi, at politikarnir govu tiltakinum ans, og eru teir nú farnir undir at fáa slíkan stovn bygdan.

Eingin skal fáa meg at viðganga, at røktarheimsspurningurin ikki er lítaður av partapolitikki, tá tað var meira umráðandi at fáa eina svimjihøll ístaðin fyri at nøkta tørvin hjá sjúklingum, soleiðis at hesir fingu sømiligt kor. — Serliga tá svimjihallir eru á Argjum og í Eysturskúlanum frammanundan!

Og kortini skulu sjúklingar húsast í eini barakk, sum var gjørd sum fyribilsloysn fyri yvir 20 árum síðan. Tað hevði verið áhugavert at fingið frágreiðing um tað neyðuga í, at tann gamla raðfylgjan um bygging av røktarheimum varð fylgd í Tórshavnar kommunu.

Annað dømi er Útvarp Føroya, sum tó er ein almennur stovnur. Her hava gjøgnum árini verið roynd ymisk tiltøk til tess at skaffa pening til bygging av einum hóskandi hús til útvarpið. Um ikki einstaklingurin hevði givið sítt ískoyti, so var útvarpið helst ikki komið longur enn til tað gamla pakkhúsið, sum útvarpsstjórin herfyri úttalaði seg í Sosialinum.

Her átti politikarnir av røttum at kent sína ábygd, men heldur ikki her góvu teir almennamálinum ans.

Av hesum dømum sæst, at ábyrgdarkenslan hjá almenninginum er nógv størri enn tann, sum politikkarin av røttum átti at kent sum sítt sermál at framt.

Vit eru nú komin í ta støðu, at politikarar ikki geva einum máli gætur, uttan so at fólk skipa seg í pressiónsbólkar, sum tá fráliður fær politikaran at lætta sær á. Urslitið er, at bert tey, sum hava áræði og duga at skipa fyri, fáa sína áhugamál framd.

Hetta hevur við sær, at almannamál gerast persónlig áhugamál, sum gevur tí fólkavalda politikaranum ein góðan bleytan kodda at hella sítt høvur á. Um eingin pressiónsbólkur er, so kann hann durva viðari.


Tí er tað mangan ein »bjarnatænasta« at taka ábyrgdina frá teimum fólkavaldu, sum eru valdir at fremja tey mál, sum almenningurin hevur sett teir til. Tað eru hesir, sum eftir røttum skulu gera arbeiðið, og vit sum skulu stuðla — og ikki umvent!

Trio í Havn og Fuglafirði

Í kvøld hava Atli Ellendersen, Sune Vejlby Brogård og Hans Nygård konsert í Havn og í morgin, skirisdag, í Fuglafirði.

Á skránni eru verk hjá Beethoven, H. D. Koppel og J. Brahms.

Teir triggir tónleikararnir hava spælt saman í fýra ár. Ljóðførini eru violin, klaver og cello.



Silvurbrúdleyp

Tann 2. apríl kunnu hjúnini Sveibjørn og Jóna á Horni, í Fuglafirði, halda silvurbrúdleyp.



100 ára føðingardagur

Leygardagin 2. apríl verður Marin Kristina Johannesen í Kollafirði 100 ár.